*Framhald av síðu 17*

meðan tær ganga við barninum.

Fylgjurnar eru øktur vandi fyri spontanari abort, føðing fyri tíðina, lágari burðarvekt, deyðføddum barni. Børn hjá kvinnum, sum hava roykt, meðan tær hava verið við barn, hava øktan vanda fyri at doyggja pinkubarnadeyða og vøggudeyða (knappligan áværtaðan deyða), tey eru í størri vanda fyri at fáa astma og bronkittis í fyrsta liviári, og seinni hava tey tarnaðan likamligan vøkstur og klára seg verri í útbúgvingini enn børn hjá møðrum, sum ikki hava roykt.

## Føroyingar roykja illa

Spurnarkanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Fyribyrgingarráðið í sept. 2002 vísir, at 37% av føroyingum 15 ár og eldri roykja hvønn dag. Hetta samanborið við 30% av danskarum.

Í aldursbólkinum 20 til 29 ár roykja heili 52%, hetta merkir, at vit kunnu rokna við, at umleið ein fjóringur (25%) av øllum, sum nú eru unglingar í 20 - 29 ára aldri, fara at doyggja av royking.

Roykitíttleikin í ymisku londunum kann lesast á hesari heimasíðuni hjá WHO: http://cisid.who.dk/tobacco/Consolidated/TCP1.asp?PY=2001

Tað er trupult at samanbera millum lond, tí aldursbólkar og tað at roykja, er definerað ymiskt í kanningunum hjá teimum ymisku londunum.

Alt, sum verður brúkt í Føroyum av tubbaki, verður innflutt, og er hetta ein brúkbarur parametur at meta nýtsluna út frá., Her verður roknað við, at smugling og tað, sum ferðafólk hava við sær, er týdningarleyst samanborið við ta ovurstóru totalnýtsluna. Besti parameturin er innflutningurin í kg. av tubbaksvøru pr. íbúgva 15 ár og eldri. Innflutninguri liggur í 2001 á samað støði sum í 1997. Nýtslan var í hæddini í 2000 og er minkað eitt vet frá 2000 til 2001.

Sum í øðrum londum er talið av fólki, sum roykir av og á ("festroykjarum") lítið, eini 4%.

Roykjarin roykir í meðal 12,8 sigarettir um dagin.

## Hvat er at gera ?

### Altjóða tiltøk móti tubbaki.

Í 1987 kunngjørdi europeiska skrivstovan hjá WHO sum tann fyrsta í heiminum eina verkætlan móti tubbaki kallað: The First European Action Plan on Tobacco 1987 -1991. WHO tilmælti limalondunum at seta í verk restriktiónir í tubbaksframleiðsluni, útbreiðsluni og marknaðarføringini. At hækka prísin á tubbaksvørum, verja ikki-roykjaran, at set í verk heilsufremjandi og upplýsandi virksemi, undirvísing av fakfólki innan heilsuverkið, og praktiska hjálp til tey, sum leggja av. Limalondini vóru eisini biðjin at "monitorera" t.v.s. at fylgja við gongdini við at gera regluligar kanningar av roykivanum og tubbaksnýtsluni.

Í 1992 var onnur verkætlanin orðað, nú nevnd verkætlan fyri tubbaksfríum Europa: Second Action Plan for a Tobacco-free Europe 1992 - 1996. Hetta skjalið legði serligan dent á at fáa limalondini at samskipa arbeiðið og at játta meira pening til tubbaksfyribyrging. Um miðuna av 90'unum var gjørt upp, at í vestureuropesiku limalondunum (stórt sæð tað samað sum ES) og í Norðurlondum var tubbaksnýtslan fallandi og deyðatilburðir av royking millum mannfólk fallandi, meðan deyðatilburðirnir av royking millum konufólk var hækkandi. Í Eystueuropeisku limalondunum var bæði tubbaksnýtlsan og deyðatilburðir av tubbaki hækkandi.

Í 3. verkætlanini fyri tubbaksfríum Europa (The Third Action Plan for a Tobacco-free Europe 1997 - 2001) vórðu sett upp ítøkilig mál, sum limalondini skuldu náa í hesum tíðarskeiðinum viðvíkjandi príshækkan, atkomiligheit, lýsingum, tiltøk móti smugling, produkt-regulering, roykfríum umhvørvi, stuðlan av roykiavvenjing, og upplýsing og undirvísing av almenninginum.

Úrslitið av hesum tiltøkum var umrøtt og almannakunngjørt í einari frágreiðing frá ráharrafundi í Warsjawa í februar 2002.

Hendan frágreiðingin kann lesast á alnótini: http://www.euro.who.int/document/tob/tobconf2002/edoc8.pdf

Frágreiðingin er bygd á hagtøl og standardiseraðar spurnakanningar í limalondunum og vísa, at við endan av tíðarskeiðinum 1997 til 2001 er talið av vaksnum roykjarum í limalondunum sum heild 30%. Í vestureuropeisku londunum er talið fallandi og óbroytt í eystureuropeisku londunum. Millum ung 15 til 18 ár var talið av roykjarum eisini 30%, men einki land kundi vísa á fallandi tal av roykjandi ungfólki.

Í Mið- og Vestureuropa var standardiseraði títtleikin av lungnakrabba fallandi hjá mannfólki men hækkandi hjá konufólki. Hetta kemst av at í flestu samfeløgum byrjaðu konufólk ikki rættiliga at roykja fyrr enn roykingin hjá mannfólki varð komin í hæddina.

Tað mest órógvandi við hesum tølum er, at talið av roykjandi ungfólki er ikki minkað. Minkingin er altso millum tey eldru. Nøkur leggja av, meðan tíð er, áðrenn tey gerast sjúk. Onnur gevast, tá tey føla, at tey eru við at gerast sjúk (roykjaralungur = "orka ikki at roykja meira"). Onnur doyggja av roykingini. Tann stóra íløgan við peningi til upplýsing, viðgerðartilboðum og forboðum hevur við øðrum orðum ikki gjørt tann stóra munin fyri tann týdningarmesta málbólkin.. Sokallaða cost-benefit av strategiini higartil er lítil. Fremst er Svøríki, har tað er eydnast, at pressa roykjaratalið niður á uml. 20%; men svenskarar brúka so ístaðin snús og skrá í stóran stíl.

Tað, sum fyribyrgjarar rokna við og bíða eftir, er at avmarkingar, restriktiónir, upplýsing og viðgerðartilboð eftirhondini blíva so umfatandi, kostnaðarmikil og tilfeingiskrevjandi, at samfelagið kemur til eitt "tipping point", har man hálsar um og sigur: hví ikki fara eftir bóltinum ístaðin fyri eftir manninum. Altso at vøran verður tikin av hillunum.

## Tiltøk her heima

Her í Føroyum gera vit, sum okkara grannalond gera: vøran stendur fríðhalga og skínur á hyllunum, meðan vit fara eftir brúkaranum og siga við hann: skamma teg at tú keypur og brúkar hasa vøruna, tú veist jú, at tað er vandamikið. Man roynir við bæði illum og góðum og við øllum snildum at fáa roykjaran at lata vera. Men sum oman fyri nevnt: roykjarin roykir óansæð, tí hann er bundin "avhengigur". Cost-benefit er lítil.

Hóast cost-benefit er lítil, so skulu vit sjálvandi gera tað, sum gerast kann eftir umstøðunum. Sum nevnt eru tað nøkur, sum hóast alt leggja av, og her eru so nøkur mannalív at spara:

1) at hækka prísin á tubbaksvøru hevur víst seg aðrastaðni at minka nýtsluna.
2) roykibann allastaðni har almeningurin kemur og í øllum almennum bygningum og stovnum. Hetta kann fáa tubbaksnýtsluna at minka hjá teimum, sum eru til arbeiðis, har roykibann er. Tá er tað ein treyt, at arbeiðsplássið ikki gevur roykjarunum eitt rúm ella ein krók at roykja í. Haraftrat verjir tað ikki-roykjaran í ein ávísan mun móti passivari royking.
3) bann móti reklamum, eisini teirri reklamu, sum fer fram í sølubúðum (t.v.s. framvísing av vøruni).
4) hækka aldursmarkið fyri at kunna keypa tubbak til 18 ár ella hægri.
5) upplýsing, sum skal vera so erlig og realistisk, at hon er ræðandi. Hyggjarakanningar í USA vísa, at hesin upplýsingarhátturin virkar best. Stuttligar og undirhaldandi lýsingar/sjónvarpsinnsløg verður av øllum, bæði roykjarum og ikki-roykjarum, mett at vera nyttuleys.
6) tilboð um hjálp til tey, sum ætla at leggja av at roykja. Hetta kann vera avvenjingarskeið, sum fakfólk standa fyri. Givið verður samrøðuterapi/atferðarterapi antin til einstaklingar ella bólkar. Tekur oftast einar 5 vikur við nøkrum tímum um vikuna. Er serliga effektivt um ein uppfylging verður gjørd við t.d. regluligari kontakt millum roykjara og terapeut.
Nikotintyggigummi, plástur, súgvitablettir, nikotininhalator og nasapístr. Tablettir bupropion. Hetta er apoteksvøra, sum kann hjálpa roykjaranum móti abstinensum og vera ein stuðul undir avvenjingini. Tað krevst ein vegleiðing fyri at brúkarin skal vita, hvussu vøran skal brúkast rætt.
Hesar vørur kundu hugsast at gerast meira populerar, um tær vóru bíligari.
7) undirvísing av skúlabørnum um royking og vandan við royking.

Teir spurningar og tær viðmerkingar, sum børnini koma við í hesum tímunum, eru serliga hugvekjandi.

Tann vanliga skeptiska viðmerkingin er hendan: "Tað kann ikki passa, at tað er so vandamikið, sum tú sigur, tí so hevði tubbak langtsíðani verið bannað".

Spurningurin, sum altíð verður spurdur er hesin:

**"Hvussu ber tað til, at tað er loyvt at selja ?", svar skyldigur.**

Hvør kann koma við einum góðum svari ? Tað hevði verið gott at fyngið eina debatt um hetta.

Tey, sum vilja vita meira, kunnu lesa hesa avbera góðu ritgerðina á heimasíðuni hjá Royal College of Physicians í London: http://www.rcplondon.ac.uk/pubs/books/nicotine/







ítróttur

Nr. 44 • mikudagur • 5. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stórdystir í miðviku



*Fyrri partur av gulldystinum verður mikukvøldið á Skála, tá VÍF vitjar StÍF*

**Avgjørdi toppdysturin hjá monnunum verður á Skála, og samstundis bresta grannarnir í Havn sama í dysti um triðja plássið**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mest sum alt árið hevur verið greitt, at gullstríðið hjá monnunum fór at standa ímillum StÍF og VÍF. Fyrst Kyndil og síðani Neistin hava tó verið nevnd sum sambiðlar, men so hvørt sum árið hevur liðið, hevur staðið alt meira greitt, at tað skuldu verða VÍF og StÍF.

Og nú verður fyrri dysturin teirra millum í grundspælinum. Hesa ferð verður dysturin leiktur á Skála, og tað er einki at ivast í, at høllin verður stúgvandi full av fólki, sum fara at koyra á sínar menn.

### Eingin favorittur

Og einki er at ivast í, at á pappírinum er talan um eina víðopna uppgerð, har eingin parturin kann rópast fyri favorittur undan dystinum. Vestmenningar hava annars verið teir, sum fyri tað mesta hava sýnt betra spælið í endaspælinum, men seinasta sunnudagin vístu strandingar, at teir nú aftur eru um at finna rætta spælið fram. Hartil siga hagtølini, at StÍF aloftast hevur havt eitt sera gott tak á VÍF seinnu árini. Eitt nú hava teir trý ár á rað sent VÍF úr steypakappingini, og í grundspælinum hava strandingarnir somuleiðis vunnið báðar dystirnar.

Hartil hevur StÍF sjálvandi eisini fyrimunin av heimavølli, men yvir høvur tykist tað vera so í hesum dystum, at tað ræður um at hava rætta dagin hjá liðunum.

Og so kann leggjast afturat, at sum støðan er í løtuni, so kann ein sigur hjá VÍF vera júst avgerandi fetið ímóti FM. Hóast liðini eru jøvn í stigum, so hevur VÍF ein munandi betri málmun. Ein málmunur, sum kann gerast avgerandi, um liðini hetta til kappingarlok fáa eins nógv stig.

### Grannauppgerð um bronsuna

Seinni dysturin mikukvøldið verður í Havn, har grannarnir báðir, Kyndil og Neistin bresta saman.

Hetta líkist mest av øllum einari uppgerð um bronsumerkini í deildini, og skal metast eftir endaspælinum, so er lítið at ivast í, at Kyndil eru favorittar her. Eftir eitt gott grundspæl, liðið fekk mest sum maksimalt burtur úr hópinum, tykist Neistin nevnliga vera steðga fullkomuliga upp.

Men tað skerst ikki burtur, at í innanhýsis uppgerðunum hevur Neistin vunnið sær eina greiða yvirvág seinnu árini, og skal gongdin vendast, so skal hetta helst vera júst nú, og fyri tey bláu man løtan mikukvøldið vera júst rætta løtan at gera hetta.

# KÍ missir tveir leikarar

**Hvørki Meinhardt Joensen ella Kristian í Vági vera at finna í KÍ hópinum hetta kappingarárið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Mánadagurin mundi kennast sum ein av teimum meira tungu hjá KÍ-venjaranum, Jan Joensen. Tveir leikarar boðaðu nevnliga frá, at teir ikki verða partur av hópinum, sum hetta kappingarárið skal verja bláu litirnar í landskappingini.

Talan er málverjan, Meinhardt Joensen, og áleyparan, Kristian í Vági.

Jan Joensen sigur, at Meinhardt mánadagin fekk boð um, at hann var sloppin á skúla í Danmark, og at hann longu týsdagin skuldi við flogfarinum avstað. Meinhardt hevur annars verið fastur fúsur í KÍ-málinum seinastu kappingarárini, men higartil í ár hevur hann verið nógv darvaður av skaða í rygginum.

Ivaleyst verður tað ístaðin ungi Karstin Joensen, sum fer at verja KÍ-málið í ár. Karstin hevur í nógv ár verið mettur sum ein av mest evnaríku málverjunum í landinum, og nú Meinhardt hevur verið tarnaður av skaða, hevur ungi avloysarin røkt uppgávuna til fulnar í teimum venjingardystum, sum KÍ hevur spælt. Hartil hevur KÍ eisini evnaríka Róa Egholm í hópinum, og spurningurin er so, um hann fer at fáa nakrar minuttir á vøllinum í ár.

Kristian í Vági kom í vár til KÍ úr LÍF, har hann í fleiri ár hevur talst millum vandamestu álopsmenninar, men nú hevur hann so gjørt av at venda aftur til Leirvíkar. Allar helst tí ov nógv tíð skuldi nýtast til venjing og ferðing, um talan skuldi verða um fyrstu deildar fótbólt.

Jan Joensen harmast sjálvsagt missin av báðum leikarunum.

- Vit hava higartil arbeitt við einum hópi upp á 20 leikarar, men hóast vit framvegis eru 18, so er einki at ivast í, at tað kennist hugtungt soleiðis at missa tveir leikarar í einum.

- At Meinhardt er farin uttanlands ger sjálvandi, at vit nú eru nakað tynri á málverjasessinum, men hinvegin var helst ivasamt, nær ryggurin hjá honum aftur var somikið sterkur, at hann hevði kunna verið við á liðnum. Kristian kom til felagið, tá venjingarnar byrjaðu í vár, og sjálvur haldi eg, at hann hevur víst góð evni. Sjálvandi skuldi hann fyrst venja seg við ferðina í fyrstu deild, men tað er einki at ivast í, at eg fegin hevði sæð hann spælt í fullgóðari venjing, men tað verður so ikki í ár, heldur venjarin.

- Enn haldi eg tó, at vit hava eitt spennandi lið. Sum sagt, so eru vit framvegis 18 mans í hópinum, og yvir høvur standi eg fyri tað mesta við einum positivum trupulleika, har góðir leikarar mugu finna seg í at sita á beinkinum, sigur Jan Joensen at enda.

## Komandi dystir

**Hondbóltur**

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 05.03 | 20.00 | Kyndil-Neistin |
| 05.03 | 20.00 | StÍF-VÍF |